MENTAMÁLARÁÐIÐ

Dagfesting: 4. august 2017
Tygara ref.:
Máltal: 16/00838-43

# Avtala um viðurlag fyri nýtslu av vardum verkum millum

# Fjølrit og Mentamálaráðið

### eftir § 9 í Avtaluni millum partarnar

Vísandi til § 9 í Avtalu millum partarnar um nýtslu av vardum verkum í miðnámsskúlunum, hægri útbúgvingarstovnum og Próvstovuni, smb. § § 13 og 14 í lóg um upphavsrætt gera partarnir hesa avtalu um viðurlag:

### § 1: Hægri útbúgvingarstovnar

Hægri útbúgvingarstovnar rinda fyri brúk av vardum verkum eftir Avtaluni 500 kr. um árið fyri hvønn ársnæming.

### § 2: Miðnámsskúlar

Miðnámsskúlar rinda fyri brúk av vardum verkum eftir Avtaluni 250 kr. um árið fyri hvønn ársnæming.

### § 3: Próvstovan

Rindað verður ikki serskilt fyri framleiðslu av próvtilfari, sum er umfatað av teimum í §§ 1 og 2 nevndu viðurløgum omanfyri.

### § 4: Innanhýsis nýtsla

Fyri innanhýsis brúk av vardum verkum eftir Avtaluni rinda teir einstøku umfataðu stovnarnir 65 kr. um árið fyri hvørt ársverk, tó ikki fyri rakstrarstarvsfólk sum t.d. í framleiðslu, reingerð ella í kantinu.

Hoyvíksvegur 72 • Postrúm 3279 • FO-110 Tórshavn
+298 30 65 00 • mmr@mmr.fo • www.mmr.fo

**§ 5: Gjaldsgrundarlag**

Hægri útbúgvingarstovnar, miðnámsskúlar, aðrir stovnar, stýri, ráð, nevndir o.l., sum eru umfatað av Avtaluni, hava eftir nærri fráboðan frá Fjølrit í styttri tíðarskeið í senn skyldu til neyvt at skráseta alla nýtslu sambært Avtaluni, og hava annars eisini í rímiligan mun skyldu til at medvirka í møguligum kanningum, sum Fjølrit ger fyri at kanna vav og slag av brúki eftir Avtaluni.

**§ 6: Gjald**

Fjølrit sendir á hvørjum ári gjaldskrav fyri nýtsluna undanfarna árið til hægri útbúgvingarstovnar, miðnámsskúlar aðrar stovnar, stýri, ráð, nevndir o.l., sum eru umfatað av Avtaluni.

**Staður og dagur:** Tórshavn, 4. august 2017

**FJØLRIT**

Atli K. Petersen, *formaður*

**MENTAMÁLARÁÐIÐ**

Rigmor Dam, *landsstýriskvinna*

Martin Næs, *deildarstjóri*